## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av suðri og stundum regn. Hitin millum 6 og 9 stig. Um kvøldið minni vindur og yvirhøvur turt.




**Veðrið fríggjadagin:**
Gul til stívt andøvsgul av suðri, seinnapartin veksur hann vindin upp í ein strúk. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 5 og 8 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og um morgunin møguliga regn, annars turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 7 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi og sólglottar, men kanska okkurt ælið. Hitin millum 4 og 8 stig.

# Klassikkarin Lítli Virgar á føroyskum

**Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út tríggjar barnabøkur**

BARNABØKUR
*Eirikur Lindenskov*

Tær tríggjar bøkurnar eru »Lítli Virgar«, »Okkurt er galið« og »Nýggi vinurin hjá Fígvli«

Lítli Virgar er ein av klassisku bókunum hjá Ole Lund Kirkegaard. Bókin er skrivað í 1967, og hon er óvanliga stuttlig. Bókin er um tríggjar dreingir Virgar, Oskar og Karl Emil, ein stork, eina føðingardagsveitslu, ein skatt, ein dreka við átta beinum og ein keypmann, sum etur kaspars-fræ.

Vit, sum hava lisið barnabøkur á donskum, kenna óvanligu bøkurnar hjá Kirkegaard, sum eisini eru óvanliga stuttligar!

Pauli Nielsen týddi bókina úr donskum. Bókin er 94 blaðsíður við stuttligum litmyndum, sum Ole Lund Kirkegaard teknaðir. Bókin er innbundin og hon kostar 120 kr.

### Okkurt er galið




Ralf Butschkow: Okkurt er galið

Lisa vaknar ein morgun og hevur varhugan av, at okkurt er galið. Hvat man tað vera? Alt tykist øðrvísi: har eru fiskar, ið flúgva, ein blandimaskina, sum gálvar, ein hylur í innkeypsvogninum… Hygg væl at myndunum - ymiskt er galið á hvørjari síðu. Bæði børn og vaksin fara at stuttleika sær, meðan tey granska bókina.

Okkurt er galið er myndabók, ið hóskar til tey 3–7 ára gomlu. Hon er 32 bls. í litum, innbundin og kostar kr. 75. Eyðna Magnussen týddi.

### Nýggi vinurin hjá Fívli




Fívil hevur fingið ein nýggjan vin, men hini dýrini duga ikki at gita, hvør ið tað er. Dugir tú?

Tað er ikki lætt, men sjálvandi, at enda sært tú, hvør ið tað er, tí á seinastu síðu er ein spegil.

Nýggi vinurin hjá Fívli er smábarnabók, hóskandi til tey 0–2 ára gomlu. Hon er 22 síður í litum, prentað á haldgott papp, og kostar kr. 60. Niels Jákup Thomsen týddi.



*Bøkurnar hjá Ole Lund Kirkegaard eru óvanligar – og óvanliga stuttligar. Tann, ið lesur, keðir seg ongantíð!*

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷16 |
| Nuuk | ÷13 |
| Qaqortoq | ÷9 |
| Ammassalik | ÷2 |
| Saint John's | ÷11 |
| Halifax | ÷5 |
| Reykjavík | 0 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 3 |
| London | 4 |
| Tromsø | 6 |
| Bergen | 3 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 1 |
| Keypmannah. | ÷1 |
| Helsinki | 0 |
| Moskva | 0 |
| Berlin | ÷2 |
| Warzawa | 0 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 1 |
| Madrid | 0 |
| Róm | – |
| Malorca | 7 |
| Athen | – |
| Malta | – |
| Tunis | 10 |
| Beijing | 9 |
| New Dehli | 20 |
| Bangkok | 33 |
| Jakarta | 29 |
| Sydney | – |
| New York | ÷1 |
| Miami | 16 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 23 |
| Panama | 32 |
| La Paz | 14 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 30 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt hátrýst, 1033 hPa yvir Suður-Skandinavia stendur mestsum í stað og viknar nakað. Eitt lágtrýst, 991 hPa vestan fyri Skotland fer móti Íslandi. Brúgvalagið haðani verður yvir Føroyum hósdagin.



Hátrýstið yvir Suður-Svøríki fer spakuliga í landsynning. Lágtrýstið norðan fyri Ísland hvørvur í landnyrðing og brúgvalagið til Føroya fer eystureftir.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 18/02 kl. 06[00]– 19/02 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 6,7°
Minsti hiti máldur í febr.: ÷11,0° Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 18/02 kl. 06[00]–19/02 kl. 06[00]
Avfallið higartil í februar: 73,7 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

16. febr.: Fullmáni
19. febr.: Mánin næstur jørðini
23. febr.: Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | Suðuroyar-/ Vágafirði sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | Hestfirði/ Sundalagnum sp. | Vestmanna-sundi fp. | Vestmanna-sundi sp. | Mykines-firði fp. | Mykines-firði sp. | Nólsoyar-firði fp. | Nólsoyar-firði sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði sp. | Hvanna-sundi fp. | Hvanna-sundi sp. | Fugloyar-firði fp. | Fugloyar-firði sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 20. feb | 09.10 | 21.34 | 08.10 | 20.34 | 08.25 | 20.49 | 11.10 | 23.34 | — | 12.10 | 07.25 | 19.49 | 06.25 | 18.49 | 09.25 | 21.49 | 10.25 | 22.49 | 08.55 | 21.19 | 10.10 | 22.34 |
| 21. feb | 09.58 | 22.23 | 08.58 | 21.23 | 09.13 | 21.38 | 11.58 | — | 00.34 | 12.58 | 08.13 | 20.38 | 07.13 | 19.38 | 10.13 | 22.38 | 11.13 | 23.38 | 09.43 | 22.08 | 10.58 | 23.23 |
| 22. feb | 10.48 | 23.27 | 09.48 | 22.27 | 10.03 | 22.42 | 00.33 | 12.48 | 01.33 | 13.48 | 09.03 | 21.42 | 08.03 | 20.42 | 11.03 | 23.42 | — | 12.03 | 10.33 | 23.12 | 11.48 | — |
| 23. feb | — | 12.06 | 11.06 | 23.46 | 11.21 | — | 01.27 | 14.06 | 02.27 | 15.06 | 10.21 | 23.01 | 09.21 | 22.01 | — | 12.21 | 00.42 | 13.21 | 11.51 | — | 00.27 | 13.06 |




fik

BILLUTIR
ÚTVEGAST TIL FLEST ALLAR BILAR
F.A. BILLUTIR
tlf. 421605 fax 421666

5 707265 100043 >